# Heimasíða til Heilsustýrið – útboð august 2024

Heilsustýrið bjóðar út framleiðslu av nýggjari heimasíðu. Útboðið verður gjørt sambært ”Rundskrivi nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum”.

## Lýsing

Heilsustýrið varð sett á stovn 1. januar 2023 og hevur í dag eina fyribils heimasíðu við ógvuliga avmarkaðum innihaldi. Kunning til almenningin og fakfólk um heilsuviðurskifti er millum fremstu mál hjá nýggja stovninum. Tí er alneyðugt við einum palli, sum kann veita føroyingum tíðindi, kunning, vegleiðing, dátur og hagtøl um heilsuviðurskifti í Føroyum. Við hesum verður framleiðslan av nýggjari heimasíðu til Heilsustýrið nú boðin út til alment útboð á Keypsportalinum.

## Tilboð

| | |
|---|---|
| Dagfesting | Heilsustýrið skal hava eina heimasíðu, sum er klár at leggja út uml. 1.nov. 2024. |
| Samstarv | Heilsustýrið og veitarin arbeiða saman um at finna røttu loysnina. |
| Tilboð | Vit vilja hava tilboð, sum inniheldur prís fyri:<br><br>• Framleiðslu<br>• Snið<br>• Hýsing<br>• Víðarimenning (tímaprís fyri 50 tímar víðarimenning fyrsta árið) |
| Krøv | Veitarin skal hava gjørt í minsta lagi 3 heimasíður, sum kunnu samanberast við hana, vit vilja hava. Sostatt skulu 3 tilvísingar (ikki fleiri) vera í tilboðnum. |
| Vekting | Veitarin verður valdur út frá hesum viðurskiftum:<br>• Prísur 50 %<br>• Góðska 50 %<br><br>Prísur inniber<br>a. Framleiðsla og sniðgeving av heimasíðu |

| | |
|---|---|
| | b. Hýsing<br>c. Tímaprísur fyri 50 tímar víðarimenning fyrsta árið<br><br>Góðska skal skiljast sum<br>a. Royndir og tilvísingar 25%<br>b. Lýsing av tilgongd og hvussu kravfesting verður møtt (tíðarlinja, fundir, verkstovur, menning, testing, slepping, eftirmeting osfr. 25 %) |
| Kravfesting | Neyðugt er, at veitarin kann bjóða eina heimasíðu, sum lýkur tey krøv, sum eru umrødd í kravfestingini. |

## Spurningar til útboðstilfar

Um partar av útboðstilfarinum er óskynsamir ella ógreiðir, ráða vit tilboðsgevarum at seta spurningar. Møguligir spurningar skulu setast áðrenn tíðarfreistina fyri spurningum. Spurningarnir verða svaraðir skjótast møguligt, og lagdir út á Keypsportalin dulnevndir. Spurningar skulu latast inn umvegis teldupost til katrin@hst.fo.

## Tíðarætlan

| | |
|---|---|
| 7. aug 2024 | Útboð.<br>Útboðið verður kunngjørt á Keypsportalinum hin 7. aug. 2024. |
| 21. aug. 2024 | Spurnarfreist.<br>Spurningar skulu sendast til katrin@hst.fo, og teir verða svaraðir so hvørt gjøgnum Keypsportalin. Freistin at spyrja er 21. aug. kl. 12.00. |
| 28. aug. 2024 | Tilboðsfreist.<br>Freistin at lata tilboð inn er 28. aug. kl. 12.00. Tilboðini skulu sendast til katrin@hst.fo. Tilboð, sum koma inn eftir hetta, verða ikki tikin við. |
| 4. sept 2024 | Avgerð.<br>Í seinasta lagi 4. sept. verður vinnarin kunngjørdur og fráboðan verður send øllum tilboðsveitarum við telduposti. |
| 1. des. 2024 | Heimasíðan fer út alment. |

## Avtala

Avtala verður gjørd við ein heimasíðuveitara, sum vinnur útboðið. Endalig avtala við tíðarfreistum o.a. verður ment í samstarvi millum Heilsustýrið og veitaran.